# Havnar Fimleika-felag vann alt

**FIMLEIKUR** Hini liðini stóðu ikki Havnar Fimleikafelag kurl í estetiskum fimleiki um vikuskiftið. HF var fremst hjá gentum, unglingum og kvinnum

Uni Holm Johannesen

Havnar Fimleikafelag situr á trónini í estetiskum fimleiki. Tað eru úrslitini um vikuskiftið bestu dømini um, tí felagið vann gull hjá gentum, unglingum og kvinnum.

Støkk og Ljósið hava annars givið Havnar Fimleikafelag góða mótstøðu í kappingunum fyrr í ár. Tá vóru tað ikki nógv stig, sum skilti liðini. Munurin var heldur ikki stórur hesaferð, men tað eydnaðist hinvegin ikki at koppa Havnar Fimleikafelag av trónini.

**0,2 stig hjá unglingum**

Genturnar løgdu fyri og sýndu fram fyri stóru mannamúgvuni, sum hevði leitað sær í høllina á Hálsi. Ljósið var nummar tvey. HF fekk 14,55 stig, og Ljósið fekk 13,80 stig.

Munurin var serstakliga lítil hjá unglingunum – bara 0,2 stig. Har var Støkk næsta liðið í røðini. Kappingin hjá kvinnunum var ikki minni spennandi. Havnar Fimleikafelag var 0,71 stig framman fyri Ljósið, og føroyameistararnir vunnu sær samstundis rættin at luttaka í heimsmeistaraskapinum, sum verður í juni.

Ítróttarsosialurin ynskir Havnar Fimleikafelag hjartaliga tillukku við flottu úrslitunum.

*uni@sosialurin.fo*

*Myndir: Hannis Wardum*



*Gentur*



*Unglingar*




*Kvinnur*

# ÚRSLITINI

## GENTUR:

| | |
|---|---|
| 1. Havnar Fimleikafelag A | 14,55 |
| 2. Ljósið | 13,80 |
| 3. Støkk | 12,50 |
| 4. Havnar Fimleikafelag B | 12,06 |

## UNGLINGAR:

| | |
|---|---|
| 1. Havnar Fimleikafelag A | 14,78 |
| 2. Støkk | 14,58 |
| 3. Ljósið | 14,26 |
| 4. Havnar Fimleikafelag B | 12,55 |

## KVINNUR:

| | |
|---|---|
| 1. Havnar Fimleikafelag | 15,81 |
| 2. Ljósið | 15,10 |